BRØV til Dimmalætting

Miðnamsskulin

Eg blev ikki kjøkkur, tá ið eg í Dagur og Vika tórsdagin 15/4 høvdi, at ymsar kreftir eru í feld at sabotera fyrireikingar av miðnamsoldbaðinum í Vágs Folk í sambara helst av Suðuroy eru bert sjúm til enn eina róynd frá ymsum kreftum í norðara helst av Suðuroy at krakla alt undir seg.

Hetta má verða bløvið eitt politiskt mál, tí eg tai ikki meg at trúgva, at foreldur í norðara helst av Suðuroy kunnu vera imóti at senda næmingarnar í skula í Vági tá ið tey ala ikki upp livasson hjólvsiðurskrefttini bíðu, tá ið skulin verður lógur.

Tað virkar eitt sindur margháttligt, tá ið ein næmingur er talat seg um, hvussu leingi tey eru heimanfra hvønn dagin, so tey faa ikki stundir at gera sítt heimaarbeiði til fullnar. Hetta hevur latið seg gjørt fyri so lítil ikki longu.? Næmingurin tek ju avgerðina um, hvussu langt tað er hjá avkomandi Sandviksingunum. Hvalbingum og Famjinsgum er ferðast suður til Vágs, men hann nevnir einki um, hvussu langt tað er hjá Sumbingum, Loptans og Akramonnum at ferðast norður á Tvøroyri, tar hann NOKK vil hava skulan.

Og at næmingatalið er stórri í norðara helst av Suðuroy, er ikki so tingt at mynda sær, tí vil fyndapolitikkinum í Suðuroy verður sunnari partur av oynni skjótt avfoltaður. So har má koma vend í, og ongantíð oy skjótt.

At enda kundi eg upplýst, at strekkið frá Tvøroyri til Vágs er líka langt sum frá Vági til Tvøroyrar, um onkur skuldi ivast.

So vatandi verður arbeiðið uppá miðnamsskulan í Vági ikki uppaftur skjotast gjørligt.

J.

Den færøske vagthund

Mikudagin 14. apríl hevði Oyggatíðindi greim, sum hevur staðið í Jyllandsposten 25. mars í ár. Greimin hevur heitið «Den færøske vagthund», og er upplýsingar ella samroða við blaðstjóran á Oyggatíðindi, sum spælir leiklutin sum eitt slag av pinslavátti. Hann sigur seg hava goldið um eina miljón í bøtum og, men tað tekur hann lætt, tí onkur má vísa á hvat gongur fyri seg í Føroyum. Leingi hevur hann stríðst einsamallur, sigur hann, men nú eru hini blóðini, serliga Dimmalætting eisini komin við. Annars verður bert eitt ein asta navn nevnt, og tað er tingmaður folkaflokksins í Eysturoy.

At blaðstjórin á Oyggatíðindi vil draga øll blóðini í Føroyum niður á sítt ótespulga blaðmannastoð, munnu tey fara at svara fyri sjálvi. Men tað tykist lógið, at bert eitt fóroyskt navn er at siggja í hesi grein. Eg havi sæð í blaðunum, at tingmaður folkaflokssins í Eysturoy hevur stevnt blaðstjóranum á Oyggatíðindi fyri ærumeiðing; skal hetta nú vera eitt hevndartiltak at royna at spilla hann út uttanlands? Eg vænti ikki hann fær nógv burt úr tí, tí aðrumevndi tingmaður er kendur bæði innan og uttanlands sum eitt heiðursmaður.

Tað sum eg helt vera mest løgið var, at Jyllandsposten tók eina so lítla undirbygda grein í blað sítt, men við at kanna tað eitt sindur, tekk eg at vita, at tveir blaðmenn høvdu verið í Føroyum, men teir voru onga tíð kunnir longur enn í ein avísan klúbba í Havn, har teir høvdu hitt blaðstjóran á Oyggatíðindi.

Oyggatíðindi skal eitast fyri at vera eitt bæði politiskt og ótrumaðarligt, eitt óheft blað atti at viðgjørt allar politiskar flokkar og allar kristligar samkomur kirkjur á líka fótt.

Um ein hevur fylgt við tí, sum Oyggatíðindi hevur skrivað seinastu árini, so er tað ein samkoma, sum hevur verið serliga forfylgd av hesum blaði, og er tað Brødrasamkoman í Føroyum.

Eitt annað ein hevur verið varur við er, at tingmenn folkaflokssins hava fingið ótrálga eyja stoyrta oman sýr seg úr hesum skitna kosti. Hesin óheftu politiski blaðkostur hevur alltíð stríðst av øllum alvi fyri at spilla folkaflokkin út. Nær hevur til dømis tvíburarbróðirin og hansara fylgismenstar fingið eina einastu negativa umtalu?

Tað er ringur fuglur, ið drítur í egið reiður. Skilir blaðstjórin á Oyggatíðindi ikki so frágt, at við at spilla Føroyar út uttanlands, so spillir hann eisini seg sjálvan út? Skilja hesir politisku pinkulingarnir, sum fyltu donsku folkatingskvinnuna við sínum sjúgni, ikki tað, at teir oyðleggja landsins umdømi og harvið sítt egna?

Skilja hesi neyðardyrmi ikki, at við at bera seg soleiðis at, gera tey Føroyum eina bjarna-tænastu?

Hvat er tað sum ger blaðstjóran á Oyggatíðindi til ein samfelagsrevsara? Er hann ikki, tá ið alt kemur til alt, bara ein organiseraður spillklutur? Vit føroyingar hava altíð sirt okkara løgmann, løgting, lóggávuvald og dómsvald. Eisini hava vit virðing fyri kirkju, frikirkjum ella øðrum samkomum, og tí nú hava føroyingar kunna við upprættum eina høyrt tíl tá samkomu teimum lystir, uttan at tokna við at verða hunddalkaðir av teirri orsøk.

Alt hetta hevur blaðstjórin á Oyggatíðindi drigið niður í sítt egna svinska runndiki. At hetta verður ovlitið atalað, kemst sjálvandi av, at fólk stura fyri at fáa runubløk kastað eftir sær av hesum blaðstjóra, sum ikki dugir frágvan fólkaskikk eru so, at hann seinastu Olavsøku kastaði sær á vatnínum beint móti olavsøkugestunum. Tað var nú spell at hann gloymdi at siga Jyllandspostinum frá tí tilburðinum.

Um nú alt er so av leiði í Føroyum, sum Oyggatíðindi vil gera tað til, um alt samfelagið er so korrupt, hvat so tá ið allir gaðar eru falnir, alt, bæði vinnulív, kommunar, løgting, landsstyri og dómsvald er gjøgnumholað sum falskt og ónytiligt, hvat tá? Eiga vit bert Den færøske vagthund einsamallan eftir? Verður hesin onossligi blaðstjóri einasta skjaldrarmerkt, føroyingurin kennur at eiga?

Tá vænti eg kreditvirðið verður lítið, men eitt skal vera vist, tað verður einki land uppbygt av sleyg, slátri og spillklutum!

G.

(5) »Rødd« - HEILAGA ANDANS!!

(Høyrir tú rødd Hansara??)

1. Korint br. kap. 12, grindi 3 lesa vit: »Tí kunngeri eg tykkum, at eingin sum talar í ANDA GUDS, sigur: »Bannaður er Jesus!«. Og at eingin kann siga: »Jesus er HARRI!« uttan í Heilaga Andanum.« »Tað er ANDIN, sum ger livandi; holdið er ikki til nakað gagn; orðini ið Eg (sigur Jesus) havi talað til tykkara, eru ANDI og eru LIV.« Hetta sama orindi stendur skrivað soleiðis í einari norskari bibli: »Det er ANDEN som gjør levende; her kan mennesket INTET UDRETTE.«- Joh. 6,63.

»Men okkum hevur Gud opinberað tað við ANDA Sinum. Andin rannsakar jú alt, eisini dypdir Guds.« 1. Korint. br. 2,10. »Men vit hava ikki fingið ANDA HEIMSINS, men Andan ið er frá Gudi, fyri at vit skulu vita, hvat okkum er givið av Gudi.« 1. Korint. br. 2,12. Men ávokstur Andans er Kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildleiki, góðska, trúfesti, spakfori, frálæti. Móti slíkum er lógin ikki. Gal. 5,22-23.

Tá ið vit liva í Andanum, so latið eisini atburð okkara vera í Andanum! Gal. 5,25.

Høyra vit rødd Heilaga Andans, og gera vit tað sum Biblian lærir okkum?? Eitt er púra sikkurt, – gerningur Andans og roddir Hansara samsvarar ALTID við Bókskap Biblinar. **Guds Heilaga Orð, er TALA Hansara.**

Má Gud í Himlinum, hjalpa okkum, so at vit dag og dagliga rannsaka »Skriftirnar fyri at siggja, um hetta var so.« Ap. 17,11. 1 Galatabr. kap. 5,17 stendur: »Tí holdið girnast móti Andanum og ANDIN móti HOLDINUM.« hesi standa hvør móti »fyri at tit SKULU IKKI gera tað, sum TIT VILJA.« Tann, sum sáar í holdi sínum, skal av holdinum heysta ØYDING; men tann sum sáar í Andanum »skal av Andanum«. HEYSTA ÆVIGI LIV!« Gal. 6,8. »Tit elskaðu! Trúgvið ikki einum og hvørjum ANDA, nei, royndi andarnar, um teir eru frá Gudi!!«- 1. br. Johannesar 4,1. »Teir eru av heimum; tí tala teir av heimum, og HEIMURIN HOYRIR TEIR.« Tann, ið kennir Gud, hoyrir okkum; tann, ið ikki er av Gudi, hoyrir okkum ikki. – Av hesum kenna vit ANDA Sannleikans og ANDA villunnar.« 1. br. Johannesar 4,5-6.

1. Apostlasøgunni lesa vit fleiri ferðir, at Heilagi Andin TALAÐI til persónar ið høvdu sett sítt álit á Hin livandi Gud Faðir, skapara Himins og jarðar.« McNair tey nú bildu gudstænastu og fastaðu, **segði HEILAGI ANDIN:** »Takið Mær út Barnabas og Saul til verkið, ið Eg havi kallað teir til!«- Ap. 13,2. Og í orindi 4 lesa vit, at teir »voru sendir út«- av Heilaga Andanum, til at prædika Evangelið um okkara Harra og Frelsara Jesus Kristus, Sonur Guds«.

= Rætt TALADI HEILAGI ANDIN við Esaiast profeti, tí fedrar tykkara, tað Hann sigur: »Far tit hetta fólk og sig: Við »hoyrandi oyrum« skulu tit hoyra og tó EINKI FATA, og við siggjandi eygum »skulu tit siggja og tó EINKI SKILJA«- Ap. 28,25-26. Soleiðis talaði Heilagi Andin við roddi Esajasar profeti, »at tey mugu venda við, so eg kundi grøt tey«- Ap. 28,27.

Hvi hoyrdu tey og tó einki tataðu?? Hví sou tey og tó einki skiltu??

Biblian sigur okkum, at hjarta í hesum fólki var hert tys hoyrdu tungliga og eygunu vóru afturlatin fyri tí sum hoyrdi Harranum til, og sostatt var TALA HEILAGA ANDANS fjald fyri teimum, og tí hvørki kendu, ei heldur hoyrdu tey »rødd Harrans«, og tað er ein alvarsom stoða at verða komin í! Tíer tað eins og Heilagi Andin sigur: »Í dag, um TÚ HOYRIR RØDD hansara, tá forherðið ikki hjørtu tykkara.«- Heb. 3,7.

– Tí so elskaði Gud heimin at Hann gav Son Sin, hin einborna, fyri at hvør tann, ið tryr á Hann (Jesus Guds Son) skal ikki fortapast, men hava ævigt lív.« Joh. 3,16. Og hann segði við meg: »Hesi orð eru trúverd og sonn; og Harrin Gud ANDA PROFETANA, hevur sent eingil Sin at vísa tænarum Sínum tað, sum SKJOTT FER AT HENDA. Eg komi skjótt!«

Sælur er tann, ið »heldur fast« við profetordini í hesi bók!«- Opb. 22,6-7.

Ein, ið fekk FRID við Gud

Norðurlendski Mentunargrunnurin:

Góð hálv millión krónur til okkara

Á fundi í Keypmannahavn um dagarnar eru góðar 6,7 mió. kr. jattaðar til ymisk mentunarlig tiltøk í Norðurlondum í ár

Føroyingar hava fingið jattað fitt av peningi úr Mentunargrunninum hjá Norðurlandaráðnum á hesum sinni.

Nevndin fyri Norðurlendska Mentunargrunninum hevur havt fund sín nr. 100 í róðmi í Keypmannahavn herfyri. Nógvar umsóknir voru komnar inn til grunnin um tiggjarligan stuðul til avris mentunarlig tiltøk í Norðurlondum.

Nevndin viðgjørdi 63 av umsóknunum, sum tilsamans fingu góðar 6,7 mió. kr. jattaðar.

Avísat treytir skulu lúkast, áðrenn nøkur jattan fæst um tiggjarligan stuðul.

»Glataðu spælmennirnir«

Umsóknir voru komnar úr øllum Norðurlondum, og millum hesar voru nakrar úr Føroyum.

Norðurlandahúsið hevur fingið jattað kr. 150.000,- úr grunninum til eina ferðafrámsyning, sum fevnir um eina hálvthundrað listaverk, ið tinmi fóroysk listafólk hava gjort.

Somuleiðis hevur Norðurlandahúsið fingið kr. 250.000,- í sambandi við fyrireikingarnar og uppsetanina av leikinum »Glataðu spælmennirnir«. Peningurin skal nýtast til utreiðslur, ið fólk, ið hava við uppsetanina og tramforslúna av leikinum at gera, og sum eru komin hendavegin úr hinum Norðurlondunum.

Jezzfestival í august

Í sambandi við árliga jazzfestivalin, ið verður 16.-21. august í ár, hevur Føroya Ríthovundafelag fingið kr. 50.000,- ið latast skulu til ferðautreiðslur hjá rithøvundum og tónlistafólki, ið sum koma til Føroyar í august.

Birthe Klinte, Ríkisumboðið, hevur fingið jattað kr. 20.000,- úr grunnmum til eina ferðafrámsyning «Fóroyska – verðurlagið«, sum hon saman við fyra øðrum kvinnum úr Føroyum skal skipa fyri í Helsingør og Esbjerg.

Nevndin fyri Norðurlendska Mentunargrunnin hevur lagt sum treyt fyri útgjaldingim, at eingin peningur verður latin til hesa ferðafrámsyning úr grunninum, fyri enn hann hevur fingið eina skriviliga váttan frá teimum frámsyningarstoðum, har frámsyningin skal fara fram.

Summartonar við Kristian Blankfeldt, ið verður 16.-21. august í ár, hevur fingið kr. 100.000,- til 2 hatiðarstevnuna, sum skipast skal fyri innan klassiskan og nútíðar tónleik. Peningurin er jattaður til ferðautreiðslur, uppihald og løn til teir tónleikarar, sum koma til Føroyar úr hinum Norðurlondum.

B.



Norðurlandahúsið hevur fingið kr. 250.000,- úr Norðurlendska Mentunargrunninum til utreiðslur í sambandi við uppsetingina av »Glataðu Spælmonnunum« eftir William Heinesen, sala

Mond Dimi Thomas

Ormur syngur og tosar



Hósdagin 22. í hesum kl. 17 verður eitt tiltak í Lærarastkulahøllini fyri børn og vaksin. Tað eru pædagognæmingar, sum skipa fyri A luttakarafelagsins standa bak. Teir: Rasmussen og Malan Thomsen. Og barnakorið hjá Torshavnar Musikkskula við Jógvan Telling syngur nakrar sangir. So verður eisini ein stórur orm úr at siggja, og hesin dugir bæði at syngja og tosa. Ein ormur, sum vit vita, hevur ju tveir endar, men framendin og afturendin eru bara ikki altíð líka sandir, og tað kann tað koma ymskt marghattligt burturúr. Hetta verður altso hósdagin kl. 17 í Lærarastkulahøllini, og verður atgongugjald at gjalda við dyrnar, verður sagt í tíðindastubba.

Frá Sjálvstýrisfelagnum í Norðoyum

Mikudagin 14. apríl hevði Norðoya Sjálvstyrisfelag aðalfund, har imillum annað val av nevnd var vald.

Nyggja nevndin sær soleiðis út:

Schumann Hansen, formaður, Hans Jacob Petersen, næstformaður, Bergur Jacobsen, skrivari, Adolf Johannesen, kassameistari og Hanna Adam, nevndarlimur.

Tiltakslimir vóru valdir Karl Heri Joensen og Joanes Bólsstein.

Sum umboð í landsfelagsnum vóru valdir Bergur Jacobsen og Schumann Hansen, eykaumboð.

Uffe var í uppskoti!

men Atli Dam vildi ikki

Tá ið tað kom fram, at formaður í donsku fóroysku undirgrundarnevndini, sum fórir samráðingarnir við Stóra-Breiland um marknaðarspurningin, tók sig aftur úr fyri at lata fóroyingum formannssessin, kallaði lógmaður floksformenninar saman til kunnandi fund.

Frammanundan hevði marknaðarnevndin viðgjørt mál.ið. Hon var ikki samd.

Á tí fundinum kom uppskot frá Edmundi Joensen, formanni Sambandsfloksins, um at heita á Uffe Ellemann-Jensen, fyrrv. danska uttanríkismálaráðharra, og biðja hann leiða samráðingarnar við bretar fyri okkum, tí at hann hevur so drúgvar uttanríkispolitiskar royndir og er ein Føroyavinur burturav.

Men hetta vildi Atli Dam ikki hoyra talan um. Hann kveistraði tað burtur.

Sjálvt um Atli Dam hevur lagt frá sær sum lógmaður og nú eisini sum formaður í Javnaðarflokkinum, er tað hann, sum stýrir, bæði marknaðarsamráðingunum og øllum tí, sum landsstyrið tekur sær av. Harafturat er hann hin avgerandi atkvoðan hjá donsku stjórnini, sum veitir okkum lánini og setir treytirnar.

Tað var okkum øllum sera týdningsfullt.

Tí tykist tað úndarligt, at Sverre Midjord í Sostalinum hin 15. apríl skrivar, at Uffe Ellemann-Jensen er tann rætti maðurin at hava undir hendi í teimum sera torfóru samráðingunum, sum standa fyri framman.

Sverre Midjord er annar limurin hjá Javnaðarflokkinum í marknaðarnevndini. Hin er Atli Dam. Og Sverri Midjord bøygdi sig fyri Atla Dam. Hvørgin teirra tók undir við at lata Uffe Ellemann-Jensen leiða tá donsk-fóroyska samráðingarnevndina. Embætismenninir eru í lagi. Teir eru dugnaligir, men teir eru har alikavel.

Sum Sverre Dan Joensen skrivar úr Bahrain, er tað neyðugt hja okkum og av stórum týdningi fyri eftirtiðina, at øll segl verða sett til fyri at vinna marknaðartrætuna við Stóra-Breiland.

Talan verður ikki minst um eitt diplomatiskt stríð, ið skal vinnast, og her hevði eingin verið betri enn Uffe Ellemann-Jensen hjá okkum at havt. Tað kundi Sverre Midjord havt sagt monnum sínum og hildið fast við.

Niels Pauli Danielsen
Kr.F.